Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: Motivatiónsfilmur

**Evni**

- Endurnýtsla
- Útbúgving
- Umhvørvi
- Samfelag

**Mælt tíðarlongd: 40 min.**

- Innleiðsla/byrjan – 5 minuttir
- Filmur - 5 minuttir
- Arbeiði við uppgávuni – 15 minuttir
- Samandráttur í felag – 15 minuttir

**Introskeið**

Undirvísingartilfar til at fremja burðardygd og endurnýtslu í byggivinnuni

## Innleiðsla

Í sjónbandinum fær lærlingurin innlit í týdningin av handverksfakum, bæði í mun til samfelagið og umhvørvið. Endurnýtsla verður løgd fram sum ein av teimum háttum, sum handverkarin kann brúka til at stuðla eini bygging, sum er betri fyri umhvørvið. Sjónbandið hevur eina stutta innleiðslu til evnið og samrøður við tríggjar persónar, sum kunnu geva kvalifiserað svar uppá spurningarnar: 'Hví er mítt fak umráðandi?' 'Hvussu kann eg gera mun?' og 'Hvat kann eg brúka mína útbúgving til?' í eini skandinaviskari samanhangi.

- Grundarlagsinnleiðsla vísir á evnir sum global upphiting og nýtslu av ráevnum í sambandi við byggitilfar og endurnýtslu.
- Í fyrstu samrøðuni verður ein vísindakommunikatørur interviewaður. Í samrøðuni gevur vísindakommunikatørurin lærlinginum vitan um týdningin av útbúnum handverkarum í mun til útlát av koltvíiltu frá byggivinnuni.
- Í seinnu samrøðuni verður ein politikari interviewaður. Politikarin hevur serliga samfelagsskiljing og svarar uppá tríggjar høvuðsspurningar úr einum samfelags-/arbeiðsmarknaðarsjónarhorni.
- Í triðju samrøðuni verður ein fyrimynd, sum longu er virkin við endurnýtslu, interviewaður. Fyrimyndin viðgerð høvuðsspurningarnar og svarar úr sínum sjónarhorni.
- Svarini verða samanumtikið til endans.

Eftir sjónbandið svarar lærlingurin nøkrum spurningum, sum eru ætlaðir sum eitt ískoyti til sjónbandið.

## Fyrireiking

Undirvísingin verður leidd við eini blanding av sjálvstøðugum arbeiði og arbeiði í felag.

# Læraravegleiðing: Motivatiónsfilmur

Fyri at klára undirvísingina krevst tað:

- At lærlingurin kann hyggja at videobrotinum frá heimasíðuni.
- At lærlingurin fær tillutað uppgávuna, sum er tengd at videobrotinum.
- At lærlingurin hevur møguleika at skriva tankar sínar niður á einum hóskandi miðli.
- At lærlingurin hevur møguleika at miðla síni svar til restina av flokkinum.

Lærarin eigur:

- At leiða gjøgnumbrotið yvirskipað.
- At seta lærlingin í gongd við at hyggja eftir sjónbandinum.
- At hjálpa lærlinginum at svara spurningunum á uppgávupappírinum.
- At stuðla við kunnleiksdeiling og geva øllum lærlingum møguleika at leggja síni svar fram.
- At hjálpa til við at greiða svarið hjá lærlingin og skriva tey á talvuna sum ein felags viðmerking.
- At gera ein felags floksviðmerking á eini plakat, sum kann heingjast upp í skúlastovuni.

Lærlinguring eigur:

- At kunna síggja og hoyra filmin.
- At kunna greiða frá (deila vitan) sínum svarum til spurningarnar.
- At kunna lurta eftir svari frá hinum luttakarunum.
- At kunna tekna/skriva notatir, sum hjálpa teimum at minnast sína vitan og síni sjónarmið.

## Læringarmál

Alment:

- Lærlingurin kann próvføra fyri sínum útbúgvingarvali (H2)
- Lærlingurin kann lýsa tørvin á útbúnari arbeiðsmegi innan byggivinnuna (V1)
- Lærlingurin kann geva íblástur og virka sum broytingarmiðil og fyrimynd fyri endurnýtslu (F1)

Umhvørvi:

- Lærlingurin kann yvirskipað endurtaka, hvat veðurlagsbroytingar merkja (V1)
- Lærlingurin kann yvirskipað greiða frá, hvussu byggivinnan ávirkar veðurlagið (V1)
- Lærlingurin kann yvirskipað lýsa avleiðingarnar við at vera líkasælur við veðurlagsbroytingar (V1)
- Lærlingurin kann meta um, hvussu byggivinnan yvirskipað kann vera við til at steðga veðurlagsbroytingunum og avmarka rávørunýtslu gjøgnum endurnýtslu (H2)
- Lærlingurin kann føra fram, at útbúgving um endurnýtslu kann gera mun fyri veðurlagið (H2)

# Lærarav egleiðing: Motivatiónsfilmur

## Innihald og endamál

Innleiðing til tilgongdina/uppgávuna av læraranum

- Lærarin leggur uppgávuna ella tilgongdina fram alt eftir, hvat skal nýtast í undirvísingini

Lærlingurin hyggur at einum sjónbandi

Lærlingurin svarar tilhoyrandi uppgávuni

- Arbeitt verður við svarini sjálvstøðugt

Lærlingurin leggur síni svar fram fyri einum floksfelaga

Lærlingurin og floksfelagin deila síni svar við flokkin

## Sundurgreining

Førleikin hjá lærlinginum at skilja og hugleiða um innihaldið í sjónbandinum, ger tað møguligt at geva meira ella minni framkomin íkast til vitanardeiling.

## Feedback og virðismeting

Við hvørjum íkasti fær lærlingurin beinleiðis feedback frá læraranum, har lærarin hjálpir við at greiða frá grundgevinginum, áðrenn íkastið verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at 'góð' íkast verða viðurkend og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv íkast verða rættað/endurtulkað í samstarvi millum læraranum og luttakaranum, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.